## Livni skuldi takast

Ein bretskur dómstólur hevði givið boð um, at fyrrverandi ísraelski uttanríkisráðharrin Tzipi Livni skuldi handtakast í sambandi við krígsbrotsverk í Gaza, tá hon eftir ætlanini skuldi koma til London seinasta vikuskiftið. Men sambært blaðnum The Guardian tók dómstólurin boðini aftur, tá tað frættist, at Tzipi Livni hevði avlýst ferðina til Bretlands. Mannarættindafelagsskapir og starvsfólk hjá ST hava lagt Ísrael undir at hava framt krígsbrotsverk í álopinum á Gaza fyrr í ár. Tzipi Livni er nú formaður í andstøðuflokkinum Kadima.



## Einki brennievni eftir

Eitt lítið flogfar av slagnum King Air, sum var á veg úr Grønlandi til Íslands um vikuskiftið, noyddist at neyðlenda, tí brennievnið var farið at ganga undan. Flogfarið var farið úr Kangerlussuaq við kós ímóti Íslandi, men mótvindur upp í 35 metrar um sekundið gjørdi, at flogfarið brúkti so nógv brennievni, at tað fór at ganga undan. So lítið brennievni var eftir í tanganum, at flogfaroið kundi ikki halda fram til Íslands ella venda aftur til Kangerlussuaq, og flogskiparin hevði tí ikki annað í at velja enn at neyðlenda í Kulusuk. Tilbúgvingin har stóð til reiðar, men flogfarið neyðlendi í øllum góðum, sigur KNR.

# Heilsutrygd javnstillar føroyingar

**Hóast tað ikki er gott latín hjá Fólkaflokkinum at avtaka privatar tryggingar og leggja tær um skattin, hevur flokkurin gjørt eitt undantak, tá tað snýr seg um heilsutrygd**

HEILSUTRYGD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fólkaflokkurin er fyri tí privata, men tá spurningurin um heilsutrygd var fyri, valdi flokkurin at taka undir við uppskotinum, og hvussu ber tað so til.

- Tað eru fleiri orsøkir til tað, men tá tað verður sagt at tað verður lagt oman á skattin, so merkir hetta ikki, at vit koma at hækka nakran skatt, sigur Jákup Mikkelsen.

Tað er soleiðis, at í 2010 og 2011 fara øll at gjalda tað sama í heilsutrygdargjaldi, 245 krónur um mánaðan, og fyri summi er hetta meiri enn í dag, fyri onnur minni.

- Eftir 2012 verður tað soleiðis, at gjaldið fyri heilsutrygd verður ein partur av almennu útreiðslunum, og ætlanin hjá Fólkaflokkinum er avgjørt ikki, at skatturin skal hækkast fyri tann skuld, sigur Jákup Mikkelsen.

Málið er beint í trivnaðarnevndina, har Jákup Mikkelsen er formaður, men fer hann at leggja dent á at fáa nakrar broytingar framdar i nevndini, áðrenn málið kemur til aðru viðgerð?

- Uppskotið hevur verið á veg í rættiliga langa tíð, og hetta er eitt av teimum uppskotunum, ið hevur verið rættiliga væl gjøgnum arbeitt, og tað er eingin ivi um, at tað er ikki nógv, ið skal nemast við, so eg væntí, at málið fær eina skjóta og góða viðgerð í trivnaðarnevndini, sigur Jákup Mikkelsen.

Hann sigur, at aðalmálið í uppskotinum er at javnseta allar føroyingar viðvíkjandi inngjaldinum og teimum tænstum, sum verða veittar, umframt at skipanin verður munandi bíligari fyri persónar undir 18 ár og fyri pensjónistar.

- Tað, sum eg rokni við hevur størstan áhuga millum fólk er, at undir nýggju skipanini koma pensjónistar ongantíð at gjalda meiri enn 1195 krónur um árið, meðan teir undir verandi skipan kunnu rinda heilt upp til 2400 krónur um árið, sigur Jákup Mikkelsen.

### Fegin um uppskotið

Hetta sama er galdandi fyri persónar undir 18 ár, meðan fólk harímillum, tað vil siga frá 18 árum upp til pensjónsaldur, í mesta lagi koma at rinda 1600 krónur um árið.

- So hetta verður ein skipan, sum ger tað, at tey, ið hava størstan tørvin á heilivági, ikki fara at gjalda so nógv, sum tey gera í dag, og tað er ein positiv vend, sigur Jákup Mikkelsen.

Hann sigur, at tað er av stórum týdningi, at keyp av heilivági ikki gerst ein alt ov stór byrða fyri tey, ið hava brúk fyri nógvum heilivági.

- Tey fólk, ið ikki hava brúk fyri so nógvum heilivági, fara ikki at fáa nakað ískoyti, men eru við at fíggja skipanina, sigur Jákup Mikkelsen.

Hann heldur talan er um eitt ómetaliga gott uppskot fyri fólk, sum hava brúk fyri tí, sum enn er sjúkrakassin.

- Eg má siga, at eg sum formaður í trivnaðarnevndini eri sera feginum um, at málið er komið so langt, og eg fari at takka Aksel Johannesen, landsstýrismanni í heilsumálum, eins og fyrrverandi heilsumálaráðharra, Hans Paula Strøm, fyri eitt væl úr hondum greitt arbeiði, sigur Jákup Mikkelsen.

Men hann gloymir heldur ikki tey fólk, sum trúliga hava umsitið sjúkrakassarnar.

- Sjúkrakassarnir hava havt eina fantastiska søgu og hava havt ein sera stóran týdning. Teir hava verið umgyrdir av fólki, ið hava víst eina sera stóra ábyrgd og eg haldi, at tað arbeiði, tey hava lagt eftir seg, hevði verið gagnligt at sæð aftur í almennu stovnunum generelt, sigur Jákup Mikkelsen.

So tað er við eitt sindur av sorgblídni, at hann sigur farvæl við sjúkrakassarnar.

- Men tíðir broytast, og nýggja skipanin fer uttan iva at verða til gagns fyri brúkararnar og eg væntí, at fólk fara at fegnast um, at tey, ið hava mest brúk fyri heilivági, fara at gjalda út við helvtina av tí, tey gjalda í dag, sigur Jákup Mikkelsen.



*Tað eru fleiri orsøkir til, at Fólkaflokkurin tekur undir við heilsutrygd, sigur Jákup Mikkelsen*

# Samstarva um umhvørvisdáta

**Føroya Náttúrugripasavn, Havstovan og Umhvørvisstovan eru gingin saman um felags heimasíðu kallað ENVOFAR**

*TÍÐINDASKRIV*

Føroyar liggja á syðra markinum til europeiska arktiska økið, og stórur partur av bæði luft og sjógvi, sum endar í Arktis, ferðast fram við Føroyum. Umhvørvisdátur frá føroyska økinum, bæði frá landi og sjógvi, eru tí av stórum áhuga bæði fyri vísund og stovnar, sum takast við umhvørviskanningar og umhvørviseftiransing.

Til at geva eina meiri beinleiðis og brúkaravinarliga atgongd til umhvørvisdáturnar frá kanningum innan hetta økið, hava hesir tríggir føroysku stovnarnir gjørt ENVOFAR. ENVOFAR er gjørd sum ein felags heimasíða envofar.fo, har hvør sum helst og nær sum helst hevur atgongd til dáta, sum brúkarin kann taka niður.

Í fyrstu atløgu eru tað dáta, sum eru framleidd til altjóða kanningar framdar av arbeiðsbólkum undir Arktiska Ráðnum sum AMAP og CAFF, sum eru savnað og gjørd atkomilig á ENVOFAR -síðuni. Tó, ENVOFAR er skipað sum ein rammu-ætlan og kann víðkast til at fevna um fleiri stovnar og sløg av dáta, so hvørt sum áhugi og møguleiki eru til tess.

Størsti denturin er lagdur á at gera dáta atkomilig, sum flokkast í hesum trimum bólkunum:

- Lívfrøðiligt margfeldni
- Mátingar í føroyskum sjógvi
- Dálkandi evnir

Hesi dáta, sum luttakandi stovnarnir hava fingið til vega, og sum eru av almennum umhvørvisáhuga, eru savnaði í ENVOFAR og eru nú tøk fyri einum og hvørjum, sum er áhugaður. Til tess at gera tilfarið so atkomiligt sum møguligt hjá føroyskum og útlendskum granskarum, er tað mesta á enskum.

Innlendismálaráðið hevur stuðlað tiltakinum.